## Føroyskur rockur róstur í Danmark



*Føroyskur rocktónleikur er væl dámdur uttanlands, og nú hava eisini onkrir danir fingið eyguni upp fyri tí føroyska*

Føroyskur rocktónleikur fær bestu skoðsmál frá donsku internetsíðuni Danish Metal. Heimasíðan ummælir í hesum døgum seinastu útgávurnar hjá Týr og Makrel, og tær fáa nógv rós

– Tann hugtakandi blandingin av heavy metal og fólkatónleiki er so sannførandi, at eg minnist ikki nakran, sum hevur gjørt tað betri. Týr er ein bólkur, sum kann koma sera langt við sínum tónleiki, skrivar ummælarin hjá Danish Metal, sum gevur útgávuni Eric the Red toppkarakter, 6 av 6 møguligum.

Eisini Makrel, sum leygarkvøldið skal spæla í Keypmannahavn, fær góð orð við á vegnum.

– Tað er mær ein gáta, hví tónleikurin hjá Makrel ikki enn er givin út uttanfyri Føroyar, heldur ummælarin.

Makrel fær 5 av 6 møguligum fyri útgávuna Wonderland.

## Danir argir inn á krossfesting hjá TV3

Kristnir felagsskapir í Danmark finnast harðliga at sjónvarpsrásini TV3, tí hon í einum lýsingarátaki fyri nýggjari røð av Robinson Ekspeditiónini nýtir krossfesting av luttakarunum sum agn.

Krossfestingin er ein kapping í einari av sendingunum í røðini. Allir luttakarnari verða hongdir á ein kross, og tann fyrsti, sum dettur av krossinum, skal út úr kappingini.

Erik Norman Svendsen, sum er biskoppur í Keypmannahavn, heldur lítið um lýsingarártakið hjá TV3.

– Hetta er púra einfalt fjant og fjast og prógv um ein sera vánaligan smakk. Men hetta er hvørki fyrstu ella síðstu ferð, at hendan týðandi stórhending verður brúkt í plattum undirhaldi, sigur hann við Kristeligt Dagblad.

Miðlagranskarin Lars Peter Melchiorsen heldur, at TV3 einki mark kennir í royndini at selja undirhald.

TV3 hinvegin heldur fast um, at myndir av teimum krossfestu Robinson-luttakarunum er góð marknaðarføring fyri sendirøðina.

– Kristindómurin hevur ikki patent upp á krossin, sigur stjórin Jesper Grønholdt við Kristeligt Dagblad.

## Hann drap svanan

Tríggir ungir dreingir hava viðgingið, at tað vóru teir, sum drupu ein av svanunum í Viðarlundini í Havn í farnu viku.

Løgreglan hevur kannað málið og er komið fram til, at tríggir dreingir hava verið uppi í illgerðini. Fyrst høvdu teir roynt at skjóta eftir dunnunum, men tá ið teir ikki raktu, skutu teir eftir svananum í staðin. Drongurin, sum skeyt svanan, var 16 ára gamal.

## Minni diskriminatión

Innflytarar í Danmark kenna seg ikki so útsettar fyri diskriminatión, sum teir plagdu at gera. Tað vísir ein kanning, sum felagið Catinét hevur gjørt fyri vikublaðið A4. 1000 innflytarar yvir 15 ár hava svarað spurningunum, og rákið er, at teir kenna seg betur í danska samfelagnum enn áður. Hinvegin halda alt fleiri innflytarar, at fjølmiðlar og politikarar ger mismun á innflytarum og øðrum dønum.

# Forelskað í Eivør



**Í dag byrjar altjóða oljuráðstevnan ONS, har Eivør Pálsdóttir skal syngja**

OLJA & SANGUR
*Hans Kárason Mikkelsen, hans@sosialurin.fo*

Men hví júst Eivør? Åse Tendernes er ONS-festivalsstjóri, og hon hevur staðið fyri at fáa Eivør Pálsdóttir til Noregs.

*Eivør Pálsdóttir skal syngja á altjóða oljuráðstevnu*

- Vit hava jú fleir góðar vinir í Føroyum, og vit hava hoyrt fleiri av hennara løgum, og vit eru vorðin púra vekk í henni. Forelskaði. Vit gleða okkum sera nógv til at møta henni, sigur Åse Tendernes.

Festivalsstjórin sigur, at tey eru fegin um at hava føroyingar á ONS, har Eivør Pálsdóttir skal syngja fyri kongi og drotning. Eivør skal eisini syngja til endaseancuna, sum er eitt sera stórt tiltak sambært Åse Tendernes.

- Norðmenn hava hoyrt um Eivør, og eg trúgvi, at fleiri norðmenn fara at tekkjast tiltakinum, júst tí Eivør skal syngja. Hon er jú so ung, og tað hava vit raðfest hesuferð, nevniliga ung talentir, sum hava framtíðina fyri sær, sigur Åse Tendernes.

## Extreme-Sports

Arctic Team Challenge er ein sokallað ævintýrakapping, sum verður hildin í Ammassalik-ökinum á eystursíðu Grönlands. Kappingin, sum er yvir 5 dagar, fevnir um ymiskar kappingargreinir, har liðini ferðast einar 250 kilometrar á sjógvi, á landi, á jökli og í fjallalendi. Í 2005 verður kappingin hildin frá 14. til 23. juli.

Greinirnar, sum kappast verður í, eru 1) fjallasúkkling, gonga og klintran í fjöllum, gonga eftir jökli og kanorógving í ísfjörðinum. Tað er eysæð, at talan er um eina sera krevjandi kapping, men eisini um eina uppliving, ið tekur luttakarnar í gjögnum nökrum av natúrvakrastu ökjunum í Grönlandi.

Kappingin sjálv er ein serlig avbjóðing, har styrki, áhaldni og evni at finna vegin fram eru avgerandi eginleikar. Heilt givið ein uppliving fyri lívið. Luttakararnir eru áhugabólkar, ið hava sett lið saman at kappast í móti luttakarum ú öllum heiminum.

Fyrsti vinningur er 100.000 krónur, annar vinningur er fýra ferðir til Grönlands við uppihaldi, meðan triði vinningur er ein tyrlutúrur eftir leiðini, har kappast verður. Fleiri upplýsingar og myndir eru at finna á www.atc.gl

## Seinasta Føroyska Mentunarkvøldið í Sjónleikarhúsinum í summar

**Í kvøld, týskvøldið 24. august, verður fyri seinastu ferð í summar farið á pall við Føroyskum Mentunarkvøldi í Sjónleikarhúsinum í Havn**

MENTANARKVØLD
*Havnar Sjónleikarfelag*

Mentanarkvøldini hava verið sera væl vitjað í ár. Hóast færri sýningar, hava fleiri áskoðarar verið í ár, samanborið við í fjør.

Føroysku Mentunarkvøldini vóru í ár stuðlað av MÁF, Tórshavnar Kommunu og Føroya Bjór.

Framførslurnar hava fevnt um yrkingar, sang, skjaldur, dans og sjónleik.

Eitt lítið, vakurt tyssi av tí mentunarliga ríkidømi, vit føroyingar eiga.

Eisini fáa gestirnir høvi at royna ymsan føroyskan mat og okkurt drekkandi afturvið, umframt at farið verður upp á gólv eisini.

Í ár hevur meginparturin av gestunum verið útlendingar, men fleiri føroyingar hava eisini nýtt høvið at koma við sínum gestum.

_ Uttan iva er tað av stórum týdningi, at Føroysk Mentunarkvøld eru hvørt ár, og Havnar Sjónleikarfelag er til reiðar at fara undir hetta aftur komandi ár, sigur sjónleikarfelagið í tíðindaskrivi.

Seinasti møguleiki at uppliva Føroyskt mentunarkvøld í Sjónleikarhúsinum í ár er í kvøld, týskvøldið 24. august kl. 20.00.

## Bert fýra gongutúrar eftir at ganga

GONGUTÚRAR
*Ferðavinnan í Suðuroy*

Fyrsti túrurin sum ferðavinnan í Suðuroy skipaði fyri í ár var av Ryskivatnið til Fámjin tann 19. juni. Síðani hava gongutúrar verði hvønn leygardag, tá avtornar tann 18. septembur er Suðuroyggin gingin úr suður í norð og úr eystri í vestur.

Leygardagin varð gingið úr Sumba og niðan á Hestin. Tann 28. august verður gingið úr Porkeri - Hovs, tann 4. september av Hestinum til Kasparsholu og oman í Akraberg, tann 11. september úr Hvalba til Sandvíkar, og tann seinasti fyriskipaði túrurin í ár er tann 18. september úr Øravík til Vágs.

Gongutúrarnir í ár hava verðið stak væl umtóktir. Ætlanin er at gongutúrar verða fyriskipaðir aftur komandi summar hvørja viku, sigur Ferðavinnan í Suðuroyar.



*Fyriskipaðu gongutúrarnir hjá Ferðavinnuni í Suðuroy hava verið sera væl umtóktir. Jákup Leo var við á túrinum úr Hvalba til Tvøroyri 7. august*



**UTTAN ÚR HEIMI**

# 60 milliardir krónur horvnar í Irak



*Tað er ikki bara í gøtunum í Irak, at óskil valdar. Tað er lítið mætari á tí fíggjarliga økinum*

**Meiri enn 60 milliardir krónur eru horvnar, síðani irakar tóku við valdinum í Irak. Nú vilja amerikanskir senatorar hava at vita, hvat er vorðið av pengunum**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Grannskoðarar hjá fráfarnu amerikonsku umsitingini í Irak eru komnir eftir, at alt ruggar ikki rætt við roknskaparhaldinum hjá irakska stýrinum, sum tók við valdinum í landinum tann 1. juli.

Sambært bretska blaðnum Sunday Times vilja grannskoðararnir vera við, at nógvar milliardir dollarar eru brúktir, uttan at nakar kann greiða frá, hvat pengarnir eru brúktir til. Amerikanska verjumálaráðið Pentagon fekk grannskoðarafrágreiðingina frá herfyri, men hevur gjørt av at stempla hana sum loyniliga, skrivar Sunday Times.

Kortini er tað komið fram, at grannskoðararnir hava havt ilt við at finna útav, hvat teir nógvu pengarnir eru brúktir til. Eitt nú hava myndugleikarnir goldið 74.000 irakskum vaktarmonnum løn, men eingin dugir at siga, hvørjir hesir vaktarmenninir eru. Eitt nú vildi ein av ráðharrastovunum í Bagdad vera við, at hon hevði 8.200 vaktarmenn í starvi, men tá grannskoðararnir spurdu seg fyri, at kundi ráðharrastovan bara vísa á 600 vaktarmenn.

Í einum føri hevði hendan sama ráðharrastovan goldið 110 milliónir krónur, men hon segði seg ikki hava nakað skjal, sum vísti, hvør hevði fingið pengarnar.

Sunday Times skrivar, at nógvir amerikanskir senatorar eru í øðini um tað fíggjarliga óskilið í Irak. Teir vilja hava at vita frá verjumálaráðnum, hvagar pengarnir eru farnir.

# Hermannamamma stevnir bretsku myndugleikunum

**Skotska Rose Gentle, sum misti sonin í Irak fyri tveimum mánaðum síðani, stevnir nú bretsku myndugleikunum. Málið er tað fyrsta av sínum slagi í Bretlandi**

IRAK-KRÍGGIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein dagin seint í juni doyði tann 19 ára gamli skotski hermaðurin Gordon Gentle, tá ein mina brast við vegjaðaran einastaðni har suðuri í Irak.

Nú ætlar mamma hansara, Rose gentle, at stevna bretsku hernaðarmyndugleikarnar. Í síðstu viku vóru hon og 14 ára gamla dóttur hennara í Downing Street í London, har tær handaðu Tony Blair, forsætisráðharra eitt mótmælisskriv. Tað eydnaðist henni ikki at fáa orð á Blair, men varaforsætisráðharrin, John Prescott, játtaði at tosa við hava. Fundurin teirra millum var kortini stuttur, og aftaná segði Rose Gentle seg ikki hava fingið nógv burturúr.

– Prescott melur sum hundur um heitan greyt, segði hon.

Mamman vísir á, at sonur hennara hevði verið á lívi í dag, um hermenninir høvdu havt útgerð, sum kundi forðað fyri, at minan brast. Teir bretsku hermenninir í Irak hava tílíka útgerð, men Gordon Gentle og felagar hansara høvdu ikki útgerðina uppi á sær vanlukkudagin í juni. Tí ætlar hon nú at ákæra herleiðsluna fyri ósketni, sigur BBC. Hon er eisini sera vónsvikin av, at tað gingu sjey vikur, áðrenn hon fekk samkenslubræv frá forsætisráðharranum.

Sakførarin hjá mammuni sigur við BBC, at herleiðslan hevur skyldu til at geva hermonnunum alla útgerð, sum kann verja teir, og hann ivast ikki í, at herleiðslan gjørdi eitt mistak í hesum førinum. Sambært blaðnum The Guardian er tað ongantíð hent fyrr, at avvarðandi hjá einum deyðum hermanni hava lagt sak ímóti myndugleikunum.

## Betri eftirlit við bankunum

Í Noregi er kreditteftirlitið farið at stúra fyri, at fólk læna seg um rygg, og tí hevur eftirlitið gjørt av at halda eygað við útlánspolitikkinum hjá bankunum, skrivar Dagbladet.

Upprunin til avgerðina er, at Per-Kristian Foss, fíggjarmálaráðharri, fyrr í summar segði, at myndugleikarnir hava ov lítið eftirlit við tí, sum bankarnir gera. Hetta hevur kreditteftirlitið tikið til eftirtektar, men Bjørn Skogstad Aamo, stjóri, sigur, at eftirlitið fer kortini ikki at seta mark fyri, hvussu nógv ein banki kann læna einum húsarhaldi. Hansara áskoðan er, at tað hevði kanska verið rættast at hækka rentuna fyri at tálma eftirspurninginum eftir lánum.

Í løtuni er rentan í Noregi eins og aðrastaðni sera lág, men Bjørn Skogstad Aamo sigur, at bankarnir eiga at siga fólki, at rentan kann koma upp á t. d. sjey prosent um eini trý ár. Ein slík rentuhækking skal ikki koma óvart á fólk, og tí fer eftirlitið nú at tryggja sær, at bankarnir ávara fólk um tað, tá teir veita fólki lán við lágari rentu.

## Einsamallir prestar

Tað var tann tíð, tá prestur bleiv roknaður sum eitt slag av einum miðdepli í sóknini, men soleiðis er ikki longur.

Ikki í Danmark í hvussu er, tí har vísir ein nýggj kanning, at 70 prosent av teimum donsku prestunum kenna seg einsamallar. Eitt nú siga teir, at teir kenna seg einsamallar á prestagarðinum, og at teir hava ov fáar felagar at skifta orð við um dagarnar. Eitt annað er, at prestar hava tagnarskyldu, og tí kunnu teir ikki tosa við onnur um trupulleikar hjá sínum sóknarbørnum. Tað ger, at teir sjálvir ganga og hugsa um tað.

Helle Christensen, sum er formaður í danska prestafelagnum, sigur við Kristeligt Dagblad, at í felagnum vita tey um einsemið hjá prestunum, og at tey ætla at økja samstarvið og samveruna ímillum teir einstøku prestarnar.

## Mótbrekka hjá Saab

Í 1989 yvirtók amerikanska stórfyritøkan General Motors svensku bilverksmiðjuna Saab, men hesum hava amerikanararnir ikki fingið nógv burturúr.

Tvørturímóti hevur keypið kostað General Motors 21 milliardir krónur hesi árini. Í fjør mátti Saab fáa góðar fýra milliardir krónur í nýggjum peningi frá móðurfyritøkuni, og í ár má General Motors lata Saab fleiri milliardir krónur afturat, skrivar Aftenposten. Saab hevði góðar fýra milliardir krónur í halli í fjør, og um ársskiftið var eginpeningurin negativur við næstan fimm milliardum krónum.

Tað er heldur einki, sum bendir á, at gongdin verður stórt betri í ár. Í fyrra hálvári seldi Saab 66.600 bilar ella 3.000 færri enn í sama tíðarskeiði í fjør, og tað er longu nú greitt, at úrslitið eisini verður hall í ár, skrivar Aftenposten. Sum eina roynd at bøta um gongdina, umhugsar General Motors at flyta Saab-framleiðsluna til eitt land í Eysturevropa.

## Seldi oyggj tvær ferðir

Ein borgarstjóri í miðamerikanska landinum Honduras er tikin og ákærdur fyri at hava misnýtt sítt vald.

Myndugleikarnir avdúkaðu í síðstu viku, at borgarstjórin hevði selt ta lítlu oynna Gueguensi, sjálvt um tað var kommunan, sum átti hana. Tað vísti seg, at borgarstjórin hevði selt einum manni oynna fyri góðar 30.000 krónur, sjálvt um tann almenni marknaðarprísurin er oman fyri 10 milliónir krónur. Handilin er nú gjørdur til einkis, og borgarstjórin skal í rættin, har hann verður ákærdur fyri at hava selt almenna hondur-anska ogn til egin áhugamál.

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at borgarstjórin hevur selt ta lítlu oynna. Tað gjørdi hann eisini fyri nøkrum árum síðani, tá hann gjørdi av at lata eitt rækjuvirki keypa hana. Eisini tann handilin bleiv ógildaður.